# Minni at fáa av gullaksi í ár

**- Men prísurin er munandi betur, sigur Tummas Justinussen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í einar seks vikur hava Polarhav og Stjørnan roynt eftir gullaksi. Eysturbúgvin og Vesturbúgvin eru eisini á gullaksaveiði, men teir byrjaðu eitt sindur seinni enn hinir báðir.

Polarhav og Stjørnan vóru í Saltangará í vikuni við 300.000 pundum.

Skipini leggja altíð veiðina upp hjá P/F Beta í Saltangará. Fiskurin verður síðan koyrdur norður til Tavuna í Leirvík, har hann verður skorin og malin til fars.

- Hendan lastin endaði øll í Leirvík. Annars hava Fiskavirking í Miðvági og Kollafjørð Pelagic keypt nakað av gullaksi. Í Miðvági verður fiskurin eisini skorin og malin til fars; í Kollafirði verður hann heilfrystur, veit Tummas Justinussen at siga.

**Minni at fáa, betri prísur**

Tummas sigur, at gulllaksafiskiskapurin hevur verið væl slakari í summar enn í fjør summar, men prísirnir hava samstundis verið væl betur.

- Góðu prísirnir hava ikki vigað upp ímóti tí, sum fiskiskapurin hevur verið minni, men hetta hevur gjørt góðan mun.

Hann heldur, at óstøðuga veðurlagið í summar er ein orsøkin til, at fiskiskapurin hevur verið minni.

Gullaksaskipini royna mest vestur av Føroya Banka og vestur úr Mykinesi.

- Meginparturin av gulllaksafarsinum fer til Noregs og Skandinaviu annars, og tað ger mun, at norska krónan lutfalsliga er sterk, sigur Tummas Justinussen.

Væntandi verða skipini á gullaksi einar tveir mánaðir aftrat.




*Polarhav og Stjørnan landaðu 300.000 pund av gullaksi í Saltangará í vikuni.*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Krúnborg fekk upp í eftir fýra hálum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Seinastu tíðina hava nótaskipini, sum fiska svartkjaft, bæði roynt í íslendskum og føroyskum sjógvi.

Trý nótaskip hava landað á Havsbrún í vikuni.



*Tríggir nótabátar hava landað til Havsbrún í vikuni*
Mynd: Vilmund Jacobsen

Krúnborg hevði 2500 tons, sum teir fingu í fýra hálum. Teir fóru avstað leygardagin og vóru inni aftur týsdagin.

Í vikuni hava Tróndur í Gøtu og Christian í Grótinum eisini verið inni; teir høvdu ávikavist 2700 og 1950 tons.

Á Havsbrún siga tey, at svartkjaftafiskiskapurin er misjavnur. Fiskur er at fáa bæði í íslendskum og føroyskum sjógvi, og viðhvørt royna skipini á markinum millum londini.

Í løtuni eru svartkjaftaskipini í føroyskum sjógvi.

# Nógv regn, men lítið vatn

NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*

Við regninum er tað næstan, sum hjá bóndakonuni, ið ringdi til djóralæknan og gramdi seg um, at hon átti ikki nær til so nógvar kávar, sum hon hevði goldið fyri ísáðing av neytunum.

Summarið hevur ikki verið nakað serligt - ikki higartil í hvussu er. Mai mánaði, ið plagar at vera tann turri mánaðin, hildnaðist illa í so máta. Juni mánaði hevur heldur ikki verið nakað at rópa hurrá fyri, og nú seta vit vónina til juli mánaða.

Tey, sum ætla sær at mála, grenja um málingaveðrið og handlarnir, sum selja máling, siga, at lítil søla er.

Tað er ov vátt í veðrinum, og seinastu dagarnar hevur hann ligið høgur í ættini - og tá er eingin lýggja heldur.

Tó so; nakrar góðar løtur hava verið, men fáar samanhangandi. Men løtan, sum er góð, er ikki ring.

**Vatngoymslurnar minka**

Hóast vit halda, at málingalíkindini eru vánalig, tí tað er ov vátt og kalt, so minkar kortini úr vatngoymslunum - eisini úr goymsluni hjá Nes kommunu á Konvatni, har hendan myndin er tikin í ivikuni.

Kommunan hevur tó aðrar "reservar" at taka til, um neyðugt, og í seinasta lagi verður vatn pumpað niðan av Toftavatni - og tað tømist ongantíð, so stórt tað er.

Djóralæknin, sum bóndakonan argaðist inn á, tí rokningarnar fyri ísáðing vóru ov stórar í mun til tað, sum undan kom, spurdi konuna, um hon átti nøkur børn.

Jú, hon átti tvey.

"So veitst tú, meðni, at tað er ikki altíð tað, ið sátt verður, sum kemur undan…"

Og soleiðis er eisini við regninum, nú hásummar er. Vit siga, at tað regnar næstan hvønn dag, men kortini minkar úr vatngoymslunum.



*Vøkur mynd av Konvatni - varði, hólmar og vindmyllan beint eystanfyri stóra hólmin. Hóast vit halda, at summarið er ov vátt, minkar úr vatngoymslunum.*
Mynd: Vilmund Jacobsen



# Finnur Helmsdal leiðari á barnaheiminum

**Fyrrverandi løgtingsmaðurin Finnur Helmsdal hevur fingið nýtt starv. Hann er nú settur sum leiðari á Føroya Barnaheimi**

STARV
*Stefan í Skorini*

– Eg eri ómetaliga spentur at fara undir hetta nýggja starvið. Her skal eg arbeiða við bæði barna- og familjuforsorg, sigur Finnur Helmsdal.

Finnur hevur júst sitið í fýra ár sum tinglimur fyri Tjóðveldisflokkin, men hann slapp ikki innaftur í tingið. Tí søkti hann hetta starvið og er nú settur sum leiðari á Føroya Barnaheimi.



*Finnur Helmsdal er júst settur sum leiðari á Føroya Barnaheimi. Hann gleðir seg nógv at fara undir hesa uppgávuna eftir fýra ár í tinginum*

Hann tekur við starvinum eftir Mirjam Johannesen, sum ikki søkti starvið. Hon hevur verið virkandi leiðari seinasta árið, eftir at táverandi leiðarin Sólrun Jacobæus fór úr starvinum.

Finnur Helmsdal er 50 ára gamal og er útbúgvin sosialráðgevi. Hann arbeiddi sum sosialráðgevi á Almannastovuni frá 1981-85. Í árunum frá 1985 til 94 var hann leiðari á andveikraverdnini, inntil hon varð niðurløgd í 1994. Eftir tað starvaðist hann á Almannastovuni í nøkur ár, áðrenn hann fór í tingið í 1998. Finnur Helmsdal hevur ikki havt nakað annað starv, meðan hann var í tinginum.

Nú skal hann so taka sær av barnaheiminum. Heimið er júst umskipað, og fyrsta uppgávan hjá Finni verður at seta tíggju fólk í starv.

Fimm umsóknir vóru til starvið, og meirilutin av umsøkjarunum vóru mannfólk, upplýsir Beate L. Samuelsen, næstformaður í nevndini fyri barnaheimið.

# Ferðafólk koyrd úr flogfarinum

**Tá ferðafólkini høvdu sett seg væl til rættis umborð á flogfarinum hjá Atlantic Airways, sum var á veg til Billund hósdagin á middegi, fingu tey brádliga boð um at fara úraftur flogfarinum**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*



*Flogfarið hjá Atlantic Airways skuldi hósdagin nýtast til bráfeingis sjúkraflutning, og tí mátti ferðafólkini fara úraftur flogfarinum*

Orsøkin var, at ein sjúklingur frá landssjúkrahúsinum skuldi flytast til Keypmannahavnar beinanvegin. Umboð fyri Atlantic Airways sigur, at einki annað flogfar var í nánd, og tí vórðu ferðafólkini biðin um at fara úraftur, tí talan var um bráfeingis sjúkraflutning.

Flogfarið skuldi til Billund, og øll ferðafólkini sluppu við Maersk-flogfarinum tveir tímar seinni. Sagt verður, at hetta kemur ógvuliga sjáldan fyri, men at seinkingin hjá ferðafólkinum í hesum førinum var ógvuliga lítil.

# Norrøna seinkað av vána veðri

Seinkin
Stefan í Skorini

Tá Norrøna kom á Havnina fríggjadagin klokkan 14, var hon seinkað heili átta tímar. Hon skuldu av røttum lagt at klokkan seks á morgni og fara av avstað aftur einar tveir tímar sienni. Nú leggur hon væntandi frá bryggju klokkan trý seinnapartin, ella tá skipið er klárt at fara.

– Orsøkin til hesa seinking er tað sera vánaliga veðrið, sum vit hava havt seinastu dagarnar, sigur Áki Jespersen á Smyril Line.

Hann sigur, at seinkingin eisini stendst av, at tað onkuntíð hevur gingið heldur striltið at fáa fólk og farm til høldar umborð.




*Norrøna hevur verið nógv seinkað seinastu tíðina av tí ringa veðrinum, sum hevur verið. Hon siglir væntandi eftir ferðaætlanini aftur í næstu viku*

Nú óskil er komið í ferðaætlanina hjá skipinum, vænta tey á Smyril Line, at siglt verður aftur eftir røttu ferðaætlanini einaferð í næstu viku. Norrøna hevur nakað at geva av á næsta túrinum til Danmarkar, men øll tann mista tíðin verður ikki tikin innaftur á hesum túrinum.

## Hóraldur Joensen verja doktararitgerð

**Týsdagin 2. juli fer Hóraldur Joensen úr Gøtu at verja doktararitgerð sína á universitetinum í Bergen**

DOKTARAHEITI
*Stefan í Skorini*

Ritgerðin hjá Hóraldi snýr seg um at skilja millum stovnar av fiski út frá fitisýrunum í gøgnunum, serliga hjartanum. Kanningarnar hjá Hóraldi vísa stóran mun í nøgdunum av ymsu fitisýrunum í toski á Landgrunninum og á Føroyabanka. Tær vísa eisini stóran mun millum ymsu sløgini av kongafiski í landnyrðings Atlantshavi, og at fýra ymsir stovnar av trantkongafiski eru í sama øki.

Hetta síðsta kann hava stóran týdning í altjóða orðaskiftinum um skipan av fiskiskapinum eftir trantkongafiski og fyri býtið millum londini.

Hóraldur hevur seinastu fýra árini verið knýttur at Fiskirannsóknarstovuni. Hann hevur áður verið lærari á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali í fleiri ár.

Ritgerðin nevnist á enskum »Discrimination among fish species and stocks by multivariate analysis of fatty acid profiles in selected tissue«.